# Vit hava øll ábyrgd, tá tað ræður um antidoping

Henda reglugerð er galdandi fyri allar limir í feløgum undir FSS. Reglugerðin byggir á altjóða reglur um antidoping, sum ÍSF hevur bygt inn í føroysku antidoping-reglugerðina.

## Ábyrgdin hjá FSS

FSS skal tryggja, at vit hava reglur og mannagongdir á økinum sum heild, og at feløgini fylgja mannagongdini. FSS skal upplýsa um hetta heimasíðuni og aðrastaðni. Henda mannagongdin er kjølfest í reglugerðini hjá ÍSF, sum er grundað á altjóða reglar hjá World Anti-Doping Agency.

## Ábyrgdin hjá feløgunum undir FSS

Feløgini skulu kunna nýggjar limir um reglurnar og tryggja, at lyftiváttanin verður undirskrivað. Feløgini skulu týðiliga vísa á hugburðin um doping. Um illgruni er um, at limur er dopaður, eigur felagið at gera limin varugan við hetta.

## Ábyrgdin hjá limunum í feløgunum undir FSS

Limirnir skulu kenna reglurnar og fylgja teimum í øllum lutum.

## Sekt

Í høvuðsheitum er sektin tann, at verður lyftari tikin fyri doping, verður hesin útihýstur frá øllum venjingum og kappingum. Lyftarin missir eisini øll størv, lønt ella ólønt í feløgum og sjálvsognarstovnum undir ÍSF.

Neyvari lýsing av reglum viðvíkjandi sekt eru í reglugerðini hjá ÍSF, sí niðanfyri.

## Tilvísingar til aðrar reglur og viðkomandi tilfar – sum FSS fylgir

| Kelda | Lýsing | Leinki |
|---|---|---|
| World Anti-Doping Agency | Altjóða myndugleikin innan antidoping, sum altjóða ítróttarsambond fylgja. | https://www.wada-ama.org/en |
| Evnislistin – bannaði evni | Listin hjá WADA, sum lýsir bannaði evni og mátar. Listin verður endurskoðaður árliga um ársskiftið. Listin er galdandi fyri allar íðkarar, eisini motionistar. | https://www.wada-ama.org/en/prohibited-list |
| Antidoping Danmark | Danski antidoping myndugleikin | https://www.antidoping.dk/ |
| **ÍSF reglugerð** | **Reglugerðin, ið er galdandi fyri føroyskan ítrótt** | **https://isf.fo/antidoping/dopingreglugerd/** |
| International Weightlifting Federation | Altjóða vektlyftingarsambandið, sum eisini hevur greiða mannagongd um antidoping | https://iwf.sport/ |
| International Powerlifting Federation | Altjóða styrkilyftingarsambandið, sum eisini hevur greiða mannagongd um antidoping | https://www.powerlifting.sport/ |
| World Kettlebell Sport Federation | Altjóða kúlulyftingarsambandið, sum eisini hevur greiða mannagongd um antidoping | https://wksf.site/# |

# Føroya Styrkisamband – váttan í samband við lyftiloyvi

Sum limur av einum felag í Føroya Styrkisambandi (FSS) vátti eg hervið, at eg teir seinastu 12 mánaðarnar hava yvirhildið og frameftir fari at yvirhalda tær til eina og hvørja tíð galdandi reglurnar ásettar av Ítróttasambandi Føroya (ISF) og altjóða styrkiítróttarsambondunum, sum eru viðkomandi. Hesi eru International Weightlifting Federation (IWF), International Powerlifting Federation (IPF) og World Kettlebell Sport Federation (WKSF).

Eg lati meg kanna til allar kanningar, ið FSS og ÍSF áleggja, herundir kanningar hjá teimum altjóða sambondunum. Hetta ger seg bæði galdandi í og uttanfyri kapping. Ein noktan at lata pissiroynd ella aðrar líknandi royndir verður roknað sum ein noktan at lata seg kanna fyri doping í mun til reglurnar hjá ÍSF.

Um eg innanfyri hetta tíðarskeiðið ella seinni loyvistíðarskeið verði funnin sekur í at bróta omanfyri nevndu dopingásetingar, forplikti eg meg til at rinda FSS fyri tær útreiðslur, ið FSS møguliga hevur havt av mær ísv t.d uttanlandsferðir, venjingarlegur, stuðul til útgerð og annað mangt seinastu 12 mánaðarnar áðrenn brotið á dopingarreglurnar. Eg skilji eisini, at eitt brot á dopingreglurnar hevur við sær, at tey føroysku metini, sum eg seti, eftir at hava skrivað undir upp á hetta skjalið, verða strikað.

Einoghvør ósemja ímillum meg og FSS um tulking av omanfyri nevnda, um støddina av gjalding av omanfyri nevndu upphæddunum, herundir sekt, ella í síni heild tulking av spurningum í mun til hetta skjal, kann verða løgd fyri gerðarætt i mun til tær reglur, sum til ta tíð eru galdandi fyri gerðarætt. FSS og eg útnevna hvør ein gerðarættarlim innan 14 dagar eftir móttøku av fráboðan um, at hin parturin hevur valt gerðarættarlim. Limirnir velja ein uppmann, sum skal vera púra ótengdur at báðum pørtum. Partarnir rinda hvør sín part av útreiðslunum til 'sín' gerðarættarlim. FSS rindar samsýning til uppmannin og møguligar útreiðslur isv gerðarættarviðgerðina.

Navn á lyftara ____________________________________________________________

Bústaður ________________________________ Postnr _______

Býur ________________ Fartlfnr ________________

Felag ___________________________________________

Nýggjur lyftari (ja/nei) _______ Um nei, seinasta felag _______________________

Undirskrift hjá lyftara ________________________ Dagur _____________________

Foreldranna undirskrift (um lyftari er yngri enn 18 ár): ____________________________

Formaður í felagnum, undirskrift _______________________ Dagur _______________